# 8 TÁ IÐ SÓTTIRNAR HERJAÐU



*Hostajavni*

Í dag, nú ið læknarnir eru nógvir, og sjúkrahús eru til hjálpar, er torført at skilja, hvussu tey hjálptu teimum sjúku í eldri tíð. Men tey hjálptust sum frægast. Tá vóru ofta ólærdir menn og ólærdar kvinnur, sum høvdu hegni og hjartalag fyri teimum sjúku. Leitað varð til teirra, tá ið sjúka kom á, ella tá ið sóttir herjaðu.

Eisini høvdu fólk mong heimaráð, sum tey nýttu, og summi teirra tykjast okkum at vera heldur enn ikki løgin.

Vit kunnu nevna nøkur fá.

Fyri **gulusótt** vóru bestu ráðini at drekka vatn, har arnarklógv var løgd niðurí. Aðrastaðni hildu tey ráðini vera betri at drekka súpan, har ein gulbeint høna var havd sum bót. Tey mettu hesi gulu beinini at hava grøðandi megi. Fyri **bróstsjúku** vóru bestu ráðini at kóka hostajavna og drekka løgin.

Ringasta sjúkan var **spitalskasjúkan**. Hon hevði verið ókend



*Fólk royndu at hjálpast við gomul heimaráð*

Digitized by Google

í Føroyum alla ta elstu tíðina, men tá ið krossfarar komu heim aftur úr Eysturlondum, bóru teir sjúkuna við sær. Hon breiddi seg um stórar partar av Evropa. Haðani varð hon borin til Føroya, og móti henni vuksu ongar grøðandi urtir.

Stutt eftir trúbótina hoyra vit um spitalskahospitalið úti á Argjum. Hospitalið man tó vera frá katólsku tíðini. Tað rúmaði 12 sjúklingum. Ein fyristøðumaður (matmeistari) ansaði eftir hospitalinum. Hann skuldi so útvega mat og annað til tey sjúku. Hospitalið hevði fastar inntøkur, men tá ið kovi og hjallar tømdust, hevði fyristøðumaðurin loyvi at fara út um landið at bidda.

*Sóttirnar vóru so herviligar, at í summum bygdum segðist bert eittans fólkið vera eftir*



Sum øldirnar liðu, minkaði spitalskasjúkan. At enda doyði hon út, og so varð hospitalið á Argjum nýtt sum sethús.

**Svartideyði** kom til Føroya um 1350. Sjúkan fór herjandi um oyggjarnar, og hon gjørdi bart, har hon kom. Í Leirvík segðist eittans fólk at liva eftir. Hetta var eitt konufólk, sigur søgnin. Hon settist undir ein bakka at kúra. Tá kom ein útróðrarbátur framvið, og soleiðis slapp hon burtur úr bygdini. Men enn í dag eitur staðið Kúribakki.

Eisini Húsavíkar bygd, sigur søgnin, doyði út av sóttini. Úr Noregi kom maður, nevndur Nevur, sendur av kongi at grunda bygdina av nýggjum. Hann giftist við teirri tiltiknu húsfrúnni í Húsavík.

Sagnir eru eisini um aðrar bygdir, ið vórðu avoyddar av sóttini.

Eisini **pokurnar** fóru av og á herjandi um landið, og tær raktu meint, har tær numu við. Seinast, tær gingu so herviliga, var 1708-10. Í Havn doyðu tá tríggir fjórðingar av fólkinum.

Søgnin sigur, at øll manningin á einum skipi, sum kom til landið, var deyð, uttan tveir mans, ið vóru deyðsjúkir. Teir, ið komu um borð til teirra, gjørdust sjúkir, og skjótt breiddi sjúkan seg oyggj úr oyggj.

Digitized by Google



*Her verður hildið, at Spitalska-hospitalið var. Fornfrøðiligur útgrevstur hevur staðfest, at kirkjugarður hevur ligið her.*

Eina ringast, sigur søgnin, var vorðið í Skúvoy. Har livdi eittans konufólk eftir. Hon sær bát koma framvið. Tað var prestbátur, ið fór til Dímunar, tí tá eins og í dag lá Dímun aftrat Sandoyar prestagjaldi. Men prestur vildi ikki taka hana við, av ótta fyri sjúkuni. Og vónbrotin noyddist hon niðan aftur í ta deyðu bygdina. Hvør sótt talan hevur verið um, veit søgnin einki at siga um.

Í 1725-26 gingu pokurnar aftur í Eysturoynni, serliga í Gøtu.

Pokunum varð vunnið á, tá ið Nólsoyar-Páll lærdi føroyingar kynstrið at koppseta ímóti hesi sóttini. Hann koppsetti sjálvur skipsmanning sína.

Í 1584 varð fyrsti lækni settur í Føroyum. Tað var Gabriel Mitens, ið samtíðis var sorinskrivari. Men einans lækni munti ikki stórt, og heimadoktararnir høvdu tí enn nógv at gera. Tað vóru tvinni ráð, teir helst nýttu. Annað var at taka blóð av fólki, og hitt var at koppseta.

*Heimadoktarar høvdu enn nógv um at vera*





*Albert Isfeld teknaði hesa myndina av Spitalskahospitalinum við støði í fornfrøðiligum metingum av, hvussu húsini kunnu hava sæð út.*

Digitized by Google

So við og við øktust læknarnir í landinum. Sjúkrahús varð bygt í Havn í 1829, og tá ið tað gjørdist ov lítið, varð farið undir at byggja nýtt landssjúkrahús í 1921. Sjúkrahús vóru eisini bygd í Klaksvík og á Tvøroyri. Hesi sjúkrahús eru seinni bæði umbygd og vaksin.

Spitalskahospitalið á Argjum er bygt nakað fyri trúbótina. Katólska kirkjan stóð fyri bygging og rakstri tey fyrstu árini. Eftir trúbótina tók kongur yvir. Argir, sum tá á døgum ikki var bygd, hoyrdi til bispagarðin í Kirkjubø. Uttan iva man hospitalið vera bygt á Argjum, tí at kirkjan átti jørðina, og at so langt var til onnur hús.





*Sjúkrahús í Havn frá 1829*

Digitized by Google